**Nr. 14/2014**

**Kristina Háfoss**
**løgtingskvinna**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a.**

**Fyrispurningur um dupult skatting av pensjón hjá føroyingum, ið flyta uttanlands, settur Jørgen Niclasen, landsstýrismanni (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

1. Metir landsstýrismaðurin, at tað er nøktandi, at tað eru gingin nærum 3 ár, har føroyingar eru skattaðir við inngjaldi av pensjón, og somuleiðis skattaðir við útgjald av pensjón, um føroyskir pensjónistar eru fluttir til Danmarkar?

2. Hvørjar samráðingar standa fyri framman við onnur lond fyri at tryggja, at føroyingar ikki verða skattaðir dupult, um teir flyta til onnur lond?

3. Hvussu langa tíð metir landsstýrismaðurin tað fer at taka, at fáa líknandi avtalur við øll onnur lond?

4. Hvørji lond kunnu føroyingar flyta til uttan at verða skattaðir bæði við inngjald og við útgjald av pensjónum teirra í 2014?

5. Hvørji lond kunnu føroyingar ikki flyta til uttan at verða skattaðir bæði við inngjald og við útgjald av pensjónum teirra í 2014?

## Viðmerkingar

Í desember 2011 valdi samgongan at kollvelta føroysku pensjónsskattaskipanina. Frá 1. januar 2012 varð pensjónsskatturin hækkaður til 40% flatskatt frá fyrstu krónu, og farið varð frá at skatta pensjón við útgjald til at skatta við inngjald. Eisini mistu kommunurnar framtíðar pensjónsskattainntøkur sínar.

| | **2011** | **2012** |
|---|---|---|
| Skatting við | Útgjald | Inngjald |
| Kapitalpensjón | 35% | 40% |
| Luta- og lívrentupensjón | Sum a-inntøka | 40% |
| Býti av pensjónsinntøkum land og kommunur | 50-60% / 40-50% | 100% / 0% |

Henda broyting hevur givið føroyingum og Føroyum nógvar avbjóðingar. Ein av mongum er, at stórur vandi nú er fyri, at føroyingar verða skattaðir dupult av pensjónum teirra, um hesir flyta til útlond.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur nú alment boðað frá, at umsíðir er gjørd avtala við myndugleikarnar í Danmark, ið skal tryggja, at føroyingar, ið flyta til

Danmarkar, ikki verða skattaðir bæði við inngjald (forskatting) í Føroyum og skattaðir av pensjónini við útgjald.

Í tíðindaskrivi úr Fíggjarmálaráðnum vísir landsstýrismaðurin í fíggjarmálum á fylgjandi: *"Á fundi í Keypmannahavn í dag hava Jørgen Niclasen, fíggjarmálaráðharri, og Benny Engelbrecht, danskur skattamálaráðharri, undirskrivað eitt ískoyti til norðurlendska tvískattasáttmálan, sum forðar fyri, at eftirløn teirra, ið flyta millum Føroyar og Danmark, verður skattað í báðum londunum."*

Føroyingar hava tó ikki bert tørv á, at kunna flyta til Danmarkar og Norðurlond, uttan at verða skattað bæði við inngjald og við útgjaldi av pensjón. Tí um rindast fyrst skal 40% við inngjald av pensjón í Føroyum, og síðan 30-40% við útgjald av pensjón í tí landi, har tú velur at búgva, tá tú gerst pensjónistur, so er nærum einki eftir av pensjónini. Tá gerst forskattingin av pensjón í veruleikanum eitt slag av stavnsbandi hjá øllum føroyingum, tá hesir røkka pensjónsaldri. Hetta kann undir ongum umstøðum góðtakast, og um tað er so, hevur hetta álvarsligar avleiðingar fyri frælsið hjá hvørjum einstøkum føroyingi.

Avtala er nú gjørd við danskar myndugleikar, ið skal tryggja, at føroyingar ikki verða dupultskattaðir av pensjónum, um flutt verður til Danmarkar, men tað tykist løgið, at tað eru gingin 3 ár at fáa hetta í rættlag. Hetta reisir samstundis spurningin, hvussu langa tíð tað fer at taka at tryggja tílíkar avtalur við øll onnur lond.

Í minsta lagi eigur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, ið saman við samgonguni hevur sett í verk forskatting av pensjón, at upplýsa føroyingar um, hvørji lond føroyingar hava møguleika at flyta til, uttan at verða skattaðir dupult – bæði við inngjaldi av pensjón í Føroyum og við útgjaldi av pensjón í útlandinum.

Fyri at fáa lýst málið, verða hesir spurningar settir landsstýrismanninum.

**Á Løgtingi, 24. oktober 2014**

Kristina Háfoss